Maðurin við Betesda hylin

Í Jerúsalem var ein hylur, sum kallast Betesda. Ein bygningur var laðaður um hylin. Bygningurin hevði fimm súlnagangir. Framvið hylinum lógu nógv sjúk og veik fólk. Hesi bíðaðu øll eftir, at aldur ella rørsla av onkrum slagi skuldi síggjast á stilla vatninum í hylinum. Tey trúðu, at tað var eingil Harrans, sum steig niður í hylin og órógvaði vatnið. Tann, sum tá var fyrstur niðurí vatnið, gjørdist frískur aftur sama hvørjari sjúku hann var raktur av.

Við hylin í Jerúsalem lá eisini ein maður, sum hevði verið sjúkur í 38 ár. Jesus sá hann liggja har og visti, at hann longu hevði ligið langa tíð. Hann segði við mannin: „Vilt tú verða frískur?“ Maðurin svaraði Jesusi: „Harri, eg havi ongan, sum hjálpa mær út í hylin, tá ið vatnið verður órógvað. Eg eri altíð ov seinur. Jesus svaraði: „Reis teg upp, tak song tína og gakk.“ Og í stundini varð maðurin frískur, og hann tók song sína og gekk.